Nógvir um boðið í verjupartinum

Óli Johannesen og Jóhannus Joensen práta saman undir venjing. Jóhannus hevur spælt sum ein brandur tveir teir seinastu dystirnar, og spurningurin er, um hann aftur fer at fáa álit frá venjaranum, nú nógvir verjuleikarar eru tøkir. Royndast føroyski landsliðsleikarin, Óli Johannesen, verður helst at síggja í føroysku verjuni í kvøld

Mynd: Álvur Haraldsen

Landsliðsvenjarin hevur positivan trupulleika, tá ið hann skal gera av, hvørjir skulu spæla í aftastu røðini, meðan hann ongantíð sum hesa ferð hevur saknað stóra álopstrumfin

TEIR FYRSTU ELLIVU
Jóannes Hansen

Tað er skilagott at broyta liðið so lítið, sum tað ber til. Hetta er og hevur verið hugburðurin hjá landsliðsvenjaranum, og Jógvan Martin Olsen endurtók hetta í vikuskiftinum.

Um hetta er reglan, og tað ikki verður gjørt undantak frá henni, so hevði spurningurin um, hvørjir ellivu skulu á vøllin í kvøld, snúð seg um, hvør skal spæla í høgra borði í staðin fyri Jákup á Borg, og hvør skal spæla á sentrala miðvøllinum í staðin fyri Fróða Benjaminsen. Hesir báðir vórðu leikbannaðir eftir gul kort í síðsta landsdystinum, sum var ímóti Týsklandi á heimavølli 11. juni.

Ta ferðina sá føroyska liðið soleiðis út: 1. Jákup MIKKELSEN, 30/–56, Molde – 3. Jóhannis JOENSEN, 16/0, FS Vágar, 2. Óli JOHANNESEN 61/1 liðformaður, Hvidovre IF, 5. Jón Rói JACOBSEN 12/0 Brøndby IF, 4. Pól THORSTEINSSON 28/0 B36 – 9. Jákup Á BORG 28/1 B36 (14. Hjalgrím ELTTØR, 8/0 KÍ, 62.), 8. Julian S. JOHNSSON 51/3 B36, 7. Fróði BENJAMINSEN 22/1 B68, 6. Rógvi JACOBSEN 21/2 HB – 10. John PETERSEN 47/6 B36, 11. Christian Høgni JACOBSEN 17/2 NSÍ (18. Jann Ingi PETERSEN 4/0 B68, 74.)

Hjalgrím Elttør avloysti ta ferðina Jákup á Borg. Fróði Benjaminsen var ta ferðina allar 90 minuttirnar á sentrala miðvøllinum saman við Juliani Johnsson. Mest upplagdi miðvallar avloysarin, Jann Ingi Petersen varð settur inn fyri Christian Høgna Jacobsen í álopinum. Tá fór Hjalgrím Elttør fram í álopið, meðan Jann Ingi fór á miðvøllin. Um liðið skal broytast so lítið, sum tað ber til hesa ferð, so verður Jann Ingi Petersen sentralur miðvallari í staðin fyri Fróða Benjaminsen, og Hjalgrím verður í høgra borði á miðvøllinum.

Verjan

Men tað verða ivaleyst framdar fleiri broytingar enn tær báðar, sum skulu gerast. Í aftastu røðini var Súni Olsen ikki tøkur ímóti Týsklandi. Eftir at tað varð greitt, at Jens Kristian Hansen ikki fór at verða tøkur til fyrstu undankappingardystirnar í ár, hevur Henrik Larsen havt Súna Olsen sum fyrsta val á vongverjanum í vinstru. Nú er Súni komin fyri seg eftir skaðan, sum helt honum burtur fyrr í summar. Tí verður hann vongverji í vinstru hesa ferð.

Pól Thorsteinsson vikarieraði í vinstra borði ímóti Týsklandi. Talan var um neyðloysn, og hóast Pól onkra ferðina áður eisini hevur verið í vinstra borði, so hevur talan altíð verið um neyðloysnir.

Pól verður roknaður sum ein av sjálvskrivaðu monnunum á liðnum. Hann er skjótur, hevur gott eyga fyri spælinum, og hann megnar væl at luttaka í framrættaða spælinum. Ikki minst hetta síðsta er týdningarmikið, táið ætlanin er, at liðið skal spæla og ikki sparka fótbólt.

Spurningurin er so, hvørjar broytingar skulu gerast fyri at fáa Pól inn á annað pláss. Tað er í hesum at landsliðsvenjarin hevur ein positivan trupulleika. Jóhannis Joensen var í juni miðverji ímóti Íslandi og vongverji ímóti Týsklandi. Báðu ferðirnar spældi hann sum ein brandur. At hann – hóast gott avrik í Reykjavík – ikki fekk miðverjuplássið aftur ímóti Týsklandi, sum hann hevði rødt so fyrimyndarliga ímóti Íslandi, boðar frá, at venjarin velur Óla Johannesen framum Jóhannis Joensen í miðverjuna. Óli var leikbannaður ímóti Íslandi. Umframt ímillum hesar spælararnar skal venjarin eisini hava Hans Fróða Hansen í huga. Hann hevur verið sannur brandur í B68 miðverjuni, síðani hann undan ferðini til Íslands varð settur av landsliðnum.

Jón Rói Jacobsen er sjálvskrivaður í miðverjuni, Súni Olsen er sjálvskrivaður á vinstra vongverja, og so er spurningurin, um tað verða Jóhannis Joensen ella Pól Thorsteinsson, sum verða í høgru, og um tað verða Óli Johannesen ella Hans Fróði Hansen, sum verða í miðverjuni. Út frá undanfarnu ferðunum er mest upplagt at hella til, at venjarin fer at velja Pól og Óla. Men liðformaðurin og metmaðurin er ivaleyst meiri hóttur hesa ferð, enn hann hevur verið nógvar tær seinastu ferðirnar av teimum 61 landsdystunum, sum hann hevur spælt. Tað skuldi ikki undrað, um Hans Fróði Hansen verður valdur tikin framum Óla Johannesen.

Tunnligt á miðjuni

Tað eru fýra møguleikar fyri síðumanni hjá Juliani Johnsson á sentrala miðvøllinum. Ein er Jann Ingi Petersen, sum fekk møguleikan fyri Julian ímóti Íslandi, men sum bara spældi fyrra umfarið. Ein annar er, at Atli Danielsen, sum hevur verið sera sannførandi á KÍ liðnum, síðani hann varð settur í hetta plássið, fær møguleikan. Triði møguleikin er, at Rógvi Jaobsen verður fluttur úr vinstru og í hetta plássið. Um Rógvi verður fluttur úr vinstru, verður tað neyðugt at finna nýggjan miðvallara í vinstra borði. Tað verður so Andrew av Fløtum. Og fjórði møguleikin er, at John Petersen verður fluttur aftur á miðvøllin. Hann røkti ofta hetta plássið, tá ið Allan Simonsen var venjari. John hevur ikki verið í hesum plássinum seinastu tvey árini, men kanska hevði tað hesaferð verið gott hugskot at flutt hann eitt sindur aftur.

Tá ið Jógvan Martin Olsen hevur tosað um at fáa meiri ferð í álopspartin, enn tað hevur verið, so kann tað bera boð um, at teir ikki ætla at Andrew av Fløtum og John Petersen skulu spæla saman, og at teir ikki ætla at John Petersen og Christian Høgni Jacobsen, sum mannaðu álopið ímóti Týsklandi, skulu spæla saman. At John Petersen verður fluttur aftur á miðvøllin loysir hendan trupulleikin, um tað ber til at siga tað soleiðis.

Todi Jónsson er so væl fyri nú, sum hann ongantíð hevur verið áður. Um hann hevði verið í álopinum ímóti Íslandi í kvøld hevði talan verið um heilt øðrvísi uppgávu bæði fyri íslendska og føroyska liðið, enn tað nú verður. Men Todi heldur seg ikki hava førleika at røkja landsliðssess samstundis sum hann spælir nógvar dystir fyri FCK. Tí er hetta als ikki eitt tema í landsliðshøpi. Men eingin ivi man vera um, at tað hevði borið heilt nýggjar møguleikar við sær, um hann var tøkur.

Eingin ivi er um, at Jákup Mikkelsen fer at verja málið í kvøld, og tað verður neyvan langt av leið, um liðið verður mett at fara at síggja soleiðis út: Jákup Mikkelsen – Pól Thorsteinsson, Jón Rói Jacobsen, Hans Fróði Hansen/Óli Johannesen, Súni Olsen –, Julian Johnsson, Jann Ingi Petersen, John Petersen, Rógvi Jacobsen –, Christian Høgni Jacobsen/Hjalgrím Elttør, Andrew av Fløtum.

Teimum ellivu, sum fara á vøllin, verður ynskt góða eydnu. Við allari virðing fyri íslendsku grannunum og við øllum góðum ynskjum fyri teirra stríði at sleppa upp í part í fyrsta endaspælinum nakrantíð, so hevði tað verið hugaligt, um tað í kvøld fyri fyrstu ferð nakrantíð hevði eydnast at fingið øll stigini frá íslendingum.

Tað ræður um at spæla rundanum íslendingarnar

John Petersen ásannar, at plássið at spæla í er minni ímóti íslendingunum, enn tað er, tá ið Skotland er mótstøðuliðið

FØROYAR – ÍSLAND
Jóannes Hansen

– Í Reykjavík spældu vit ikki væl, og tá vóru vit heilt tætt við at fáa javnleik, sigur John Petersen um tann síðsta dystin ímóti Íslandi, og hann hevur góðar vónir um at fáa eitt gott úrslit hesuferð

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað er eitt lítið ár síðani størstu løtuna yvirhøvur hjá John Petersen á landsliðnum. 7. september í fjør skoraði hann tvær ferðir og legði harvið Føroyar á odda 2-0 ímóti Skotlandi.

Nú vitjar Ísland í Føroyum. Tað er tætt stríð um plássini í álopinum, men tað má roknast sannlíkt, at John Petersen aftur hesa ferðina verður annar av monnunum í fremstu rað.

John, sum í kvøld verður á landsliðnum fyri 48. ferð og sum tann sætti føroyski spælarin kann røkka hálvt hundrað landsdystin í síðsta landsdystinum í ár (á heimavølli ímóti Litava 10. september), kennir væl íslendskan fótbólt. Í 2000 spældi hann við Leiftri á Ólafsfirði, sum tá var millum tey stinnastu í bestu deildini. leiftur luttók í Intertoto Cup. Í fyrsta umfarinum, sum var ímóti Luzern skoraði John á útivølli í Sveis, og í øðrum umfari skoraði hann á heimavølli ímóti franska Sedan.

Tá ið vit spyrja John Petersen, hvør stóri munurin er at spæla við føroyska landsliðnum ímóti Skotlandi og ímóti Íslandi, svarar hann soleiðis:

– Í báðum førum er talan um stóra mótstøðu, og í báðum førunum hava vit møguleika at røkka góðum úrsliti. Tað sóu vit í fjør, tá ið vit megnaðu javnleik ímóti Skotlandi, og tá ið vit fyrr í summar taptu 2-1 í Reykjavík, tí teir skoraðu sigursmálið í yvirtíðini. Ímóti Skotlandi hava vit altíð fingið pláss at spæla. Teir hava ikki dekkað okkum so tætt, at vit ikki hava fingið møguleika at taka bóltin til okkara og spæla hann víðari. Bæði í íslendsku landskappingini og eisini í landsdystunum ímóti Íslandi hevur tað verið soleiðis, at teir hava dekkað okkum heilt tætt. Tað hevur so at siga ikki borið til at fingið tak á bóltinum, áðrenn tað hevur verið neyðugt at senda hann víðari.

Hvør er so heilivágurin, tá ið Ísland er mótstøðuliðið?

– Vit spældu ikki væl í Íslandi fyrr í summar. Okkum eydnaðist ongantíð at fáa tak á spælinum. Teir vóru skjótir á okkum, og vit mistu bóltin alt ov skjótt. Um spælið skal eydnast, so mugu vit fyri tað fyrsta flyta okkum nógv, soleiðis at bóltheldarin hevur fleiri møguleikar at senda víðari. Tað er eisini alneyðugt, at vit sjálvsálitið hjá okkum er so mikið stórt, at vit tora at spæla. Um vit fara at sparka, so tapa vit, tí teir eru helst eitt sindur betri fyri enn vit kropsliga, sjálvt um vit hava fleiri spælarar á liðnum, sum eru góðir í luftini, og fleiri sum eisini megna nærdystirnar á jørðin í væl. Um tað eydnast okkum at spæla saman og at bjóða av í ein móti einum støðum og at sneiða framvið teimum, so røkka vit langt. Tað ræður um at fáa teir at hava virðing fyri okkum, so teir ikki fara at hanga so tætt uppi í okkum, heldur John Petersen, sum leggur afturat, at tað í verjupartinum ikki er minst týdningarmikið at byrgja fyri innleggunum.

Mugu mynda meiri

John Petersen roknar ikki við, at íslendingarnir eru serliga hugaðir í at vera við til at mynda undirhaldandi fótbóltsspæl.

– Á Laugardalsvøllinum megnaðu vit ikki at spæla tað, sum vit ofta hava gjørt. Ísland hevði leikliga yvirvág, men teir spældu nógv við longum sendingum. Í íslendskum fótbólti verða nógvir dystir avgjørdir í sambandi við deyðbóltsstøður. Málini verða skorað í sambandi við fríspørk og hornaspørk. Soleiðis var tað eisini, tá ið teir vunnu 2-1 á okkum. Annað málið fingu teir eftir fríspark, og hitt fingu teir eftir innlegg úr borðinum.

Og úrslitið?

– Í Reykjavík spældu vit ikki væl, og tá vóru vit heilt tætt við at fáa javnleik. Eg havi spælt tríggjar ferðir ímóti Íslandi, og tað hevur verið nær við hvørja ferð. Fyrsta ferðin var í Höfn í 1997. Tá taptu vit 1-0. Teir skoraðu málið, tá ið 2. hálvleikur var 52 minuttir gamal. Onnur ferðin var á Tórsvølli fyri fýra árum síðani. Ta ferðina skoraðu teir sigursmálið í 3. minutti, men vit vóru tætt við, tí Allan Mørkøre misnýtti brotsspark ta ferðina. Íslendingar eru drúgvir, men vit eiga at hava møguleika ímóti teimum, heldur John Petersen, sum er tann av spælarunum, sum nú mynda landsliðið, ið hevur skorað flest mál.

Bólkur 5

		d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Týskland	5	3	2	0	8	3	5	11
2	Ísland	5	3	0	2	9	5	4	9
3	Skotland	5	2	2	1	7	5	2	8
4	Litava	6	2	1	3	4	9	-5	7
5	Føroyar	5	0	1	4	4	10	-6	1

Prísirnir upp í loft

Áskoðarafelagið 12. maður fýlist á, at eitt atgongumerki til landsdystin ímóti Íslandi kostar tað sama sum atgongumerkini til dystin ímóti fótbóltsrisanum Týskland

ATGONGUMERKI
Stefan í Skorini

Ikki kann sigast annað enn at prísirnir á atgongumerkjum til landsdystir eru farnir upp í loft síðan næstseinasta landsdystin.

Tá Føroyar seinasta heyst spældi ímóti Skotlandi á Svangaskarði kostaði eitt atgongumerki umleið 170 krónur. Eitt ár seinni kostar eitt atgongumerki til landsdyst ímóti Íslandi 250 krónur. Hetta halda mong vera alt ov nógv.

Tá Ísland og Skotland kunnu samanberast í styrki, og tí skuldi tað verið eins áhugavert at hugt eftir einum dysti ímóti Skotlandi sum ímóti Íslandi.

– Tað eigur at vera ein munur á prísinum, tá vit spæla ímóti teimum stóru tjóðunum sum Týskland, og tá vit møta smærri londum, sigur Regin Egholm frá 12. manni. Prísurin fyri eitt atgongumerki til landsdystin ímóti Íslandi er 250 krónur. Atgongumerkini til landsdystin ímóti Týskland kostaðu tað sama.

Hann heldur, at tað eitt eitt sera stórt lop í prísinum. Hann hevur funnið nøkur gomul atgongumerki fram. Hesi atgongumerkini eru frá dystunum ímóti Luksemborg og Sveis, sum vóru fyri fáum árum síðani. Tey kostaðu 170 krónur, men nú kostar tað brádliga 250 krónur at fara til landsdyst.

Hann er bangin fyri, at fólk fara at setast aftur, av tí at tað kostar ov nógv, men hinvegin hevur veðrið ofta eins stóran týdning.

Nevndin setir prísin

Tað er nevndin í FSF, sum ásetir prísin á atgongumerkjunum, og hon gjørdi av, at prísurin fyri dystirnar ímóti Týsklandi og Íslandi skuldi vera tann sama.

– Vit vænta ikki, at fólk fara at setast aftur av hesi orsøk. Ísland er eitt áhugavert mótstøðulið, tí at vit hava møguleika fyri at fáa stig í hesum dystinum. Eisini er hetta okkara nærmastu grannar, og tí er spenningurin stórur, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF.

Prísurin fyri eitt atgongumerki til landsdystir hjá Føroyum eru farnir upp í loft. Myndin av áskoðarum er frá dystinum millum Føroyar og Sveis á Svangaskarði, tá tað bert kostaði 170 krónur at fara til landsdyst

Savnsmynd

Vit kunnu bert staðfesta, at eftir einum ári hevur FSF lagt 80 krónur afturat prísinum fyri eitt atgongumerki, og at ein vandi er fyri, at fólk setast aftur av hesi orsøk.

12. Maður hitar upp í Club 20

FÓTBÓLTUR
TíYindaskriv

12. Maður skipar fyri upphiting til dystin Føroyar-Ísland á Tórsvølli mikudagin.

Á skránni er ókeypis andlitsmáling, felagssangur, tipping o.a.

Eisini verður søla av fløggum, turrukleðum, húgvum, blusum o.ø.

Nógv góð tilboð til limirnar. Havi limakortið við.

12. Maður bjóðar ókeypis øl & sodavatn til limirnar. Nýggir limir kunnu tekna seg.

Byrja verður kl. 15.00. Kl. 18.15 verður skrúðgonga niðan á Tórsvøll.

Øll eru vælkomin.